# Norskur útflutningur av sjómati økist í virði

Útflutningsvirðið í 1999 er út við 30 milliardir kr. Høvuðsorsøkin til vøksturin liggur hjá norsku alivinnuni, sum í 1999 hevur útflutt 380.000 tons av laksi

Sambært norska blaðnum „Fiskaren“ er útflutningsvirðið á norskum sjómati økt við 10 milliardum kr. síðan í 1995. Útflutningsvirðið í 1999 er út við 30 milliardir kr.

Sjálvt um fiskakvoturnar seinnu árini eru minkaðar og einstakir marknaðir hava verið óstabilir, hevur norska fiski- og alivinnan økt um virðið á útflutninginum. Ein av orsøkunum til hetta er, at norska fiski- og alivinnan dugir alt betri at skifta millum marknaðir, alt eftir hvussu marknaðarviðurskiftini eru.

**Prosentvísa økingin**

Prosentvíst er økingin á norska útflutningsvirðinum av sjómati minka seinastu 5 árini, men í krónum er ein øking við umleið 2 milliardum kr. árliga. Høvuðsorsøkin til vøksturin liggur hjá norsku alivinnuni, sum í 1999 hevur útflutt 380.000 tons av laksi, sum er ein øking uppá 20% sammett við 1998.

Framtíðarvánirnar fyri norsku fiski- og alivinnuna eru eisini góðar. Stjórin fyri Eksportutvalget for fisk Dag Eivind Opstad spáar, at í 2004 vil útflutningsvirðið á norskum sjómati fara upp um 40 milliardir kr. Norski granskingarstovnurin Sintef hevur gjørt eina framtíðarkanning, sum vísir, at áðrenn 10 ár eru farin vil útflutningsvirðið av fiski- og alivinnuni fara upp um útflutningsvirðið av vørum frá norsku oljuvinnuni.

# Lailu Elfridu Nielsen til áminningar



Laila doyði bert 55 ára gomul. So fá vóru árini, og sum altíð, tá fólk doyggja, koma bíbiuorðini "deyðadagur er betri enn føðingardagur" fram í hugan. Mundi deyðadagurin kennast Lailu sum ein loysn burtur úr einum lívi, ið bara gjørdist tyngri og tyngri? Kanska - men hvør varnaðist tað? Hon bar jú alt við toli og vón.

Fyri umleið 20 árum síðani kom hon við manni og soni úr Danmark og búsettist í Klaksvík. Har gjørdi hon skjótt vart við seg - fitt og fryntlig, sum hon var, og altíð fús at tosa um Bíbliuna. Leygarmorgun var hon í nógv ár ein fastur partur av gøtumyndini í Klaksvík, tí tá sást hon altíð til gongu á gøtuni, har hon bjóðaði øllum eitt prát og bíbilskan lesnað.

Vit, sum kendu hana, vita, at hon umframt hetta var ein góð kona og mamma og framúr fitt í hondunum. Hon bant, heklaði, seymaði og vav av einslistum og gleddi mangan bæði familju og vinir við sínum nógvu heimavirkaðu gávum. Tí hevur tað ivaleyst verið serstakliga ringt hjá henni at síggja sínar virknu hendur kropna og gerast ónýtiligar dag frá degi at kalla. Nei, lætt hevur tað ikki verið fyrst at fáa krabbamein og — í kjalarvørrinum á hesi herviligu sjúku — eisini vøddasvinn, sum óhugnaliga skjótt tók allan førleika frá henni og bant hana til koyristólin. Men júst tá kom veruligi styrkin hjá Lailu til sjóndar. Tú hoyrdi hana ikki gremja seg, hon var framvegis bara glað og fryntlig, láturin var ongantíð langt burturi. Spurdi tú, hvussu hon bar seg at, duldi hon ikki fyri, at tað var trúgvin, sum allan vegin bar hana ígjøgnum.

Tit, sum stóðu hjarta hennara nærmast, hava við Lailu mist ein trúgvan og dyggan stuðul, konu, mammu og ommu, og vit eru nógv, sum kenna við tykkum og ugga okkum við, at Hann, sum fyrr megnaði at geva deyðum lív, framvegis livir.

**Ein vinkona**

# Eg gjørdi bara sum eg var biðin

*– Helena Dam á Neystabø var fult kunnað um allar sparingarnar, sum ætlanin var at seta í verk á Landssjúkrahúsinum, sigur Jákup Mørkøre*




*Helena Dam á Neystabø var fult kunnað um ætlaðu sparingarnar á Landssjúkrahúsinum, áðrenn tær vóru almannakunngjørdar. Men fyri at tryggja seg, spurdi Sjúkrahúsleiðarin tvær ferðir, dag um dag, um hann ikki skuldi kunna hana um sparingarnar. Men svarið var báðu ferðir, at tað var óneyðugt, tí Helena Dam á Neystabø var fult kunnað*

Áki Bertholdsen

– Eg havi bara hildið meg til tað, sum eg eri biðin um at gera. Og Helena Dam á Neystabø hevur verið fult kunnað um tær sparingar sum ætlanin var at seta í verk á Landsjúkrahúsinum í ár.

Jákup Mørkøre, leiðari á landssjúkrahúsinum er ikki samdur í at hann hevur verið so ringur at hava við at gera, sum Helena Dam á Neystabø førir fram í grundgevingini fyri at siga hann upp-sí greinina omanfyri.

Vit hava fingið at vita, at í eini frágreiðing, sum hann hevur gjørt í sambandi við uppsagnina, ger hann greitt, at hann hevur ikki gjørt annað enn tað, sum hann er biðin um.

Og hann leggur eisini dent á, at landstýrismaðurin og almanna og heilsumálum hevur alla tíðina verið fult kunnaður um tey stig, sum ætlanin vóru at taka fyri at spara á Landssjúkrahúsinum.

Almanna- og heilsumálastýrið bað hann harafturat halda fram við arbeiðnum.

Tað vil siga, at Almanna og heilsumálastýrið góðtók, at tað var neyðugt at spara góðar tríggjar milliónir í lønum í ár fyri at játtanin kundi halda.

**Full sparing beinanveg**

Eitt nú boðaði hann fyrst í oktober stýrinum frá, at skulu fólk sigast upp, fara vit aftur í ár inn í eina ringrás, har vit hótta fólkið.

Men skulu vit taka árini frammanundan sum dømi, verða hóttanirnar uttan orsøk, tí at enda broytist fíggjarkarmurin og eftir stendur bara ágangurin á starvsfólkið.

Seint í november fær hann bræv frá almanna- og heilsumálastýrinum, har hann verður mintur á, at hann er settur at reka Landssjúkrahúsið fyri tað játtan, sum verður ásett og tað verður tikið sum eitt tekin um óloyalitet at hann boðar frá, at hann ætlar at søkja um eykajáttan

Fyrst í hesum árinum var fundur millum sjúkrahúsleiðaran, læknastjóran, aðalstjóran í almanna og heilsumálastýrinum og Helenu Dam á Neystabø um fíggjarætlanina fyri 2000.

Har varð gjørt greitt, at tað komu at mangla 1,6 milliónir í til lønir.

Harafturat eru nýggjar útreiðslur uppá 1,6 millión til nýggja læknastjóran, sjúkrasystrastjóran og teirra skrivstovur í sambandi við broytingarnar í leiðslubygnaðinum.

Harafturat taka deildirnar eitt hall uppá 3,7 milliónir frá í fjør við sær til í ár.

Landsstýrismaðurin segði seg vilja royna at finna 1,6 millión til nýggju leiðsluna aðrastaðni.

Helena Dam á Neystabø helt tað tó verða neyðugt at spara 1,6 millión.

Á fundi á Landssjúkrahúsinum varð gjørt av at granska allar sáttmálar so at øll fyrilit kundi takast í sambandi við møguligar uppsagnir, m.a í sambandi við at leggja húsavørðarnar, vekslaran og sjúkraflutningstænastuna saman.

**Fekk boð um at spara minst 3 milliónir**

Mánadagin 10. januar gjørdi Høgni Joensen, aðalstjóri í almanna- og heilsumálastýrium súkrahúsleiðaranum varugan við, at tað bleiv neyðugt at spara minst tríggjar milliónir í lønum á Landssjúkrahúsinum.

Hetta endurtók hann dagin eftir.

Á fundi millum sjúkrahúsleiðaran og fíggjardeildina hjá stýrinum týsdagin 11. januar, verður tað somuleiðis greitt, at tað er neyðugt at spara upp til 3,2 milliónir beinanvegin og harafturat undirskotið hjá deildunum uppá 3,7 milliónir uppá eini tvey ár.

Avtalað verður at arbeiða víðari við málinum.

Sama dag kunnar sjúkrahúsleiðarin álitisfólkini, Starvsmannafelagið, Arbeiðsmannafelagið og Sjúkrasystrafelagið um tær ætlaðu broytingarnar og.

Eisini hevur sjúkrahúsleiðarin fund við ein fulltrúa á fíggjardeildini um fíggjarætlanina og, hvørjir møguleikar eru.

**Vildi tryggja seg**

Sama dag setir sjúkrahúsleiðarin seg eisini í samband við aðalstjóran, Høgna Joensen, fyri at tryggja sær, at talan skal vera um tríggjar milliónir í sparingum og um Jákup Mørkøre skal kunna landsstýrismannin um sparingarnar.

Men tað var ikki neyðugt, tí landsstýrismaðurin var fult kunnaður, svaraði Høgni Joensen.

Seinni sama dag fekk sjúkrahúsleiðarin at vita frá fíggjarstjóranum í almanna og heilsumálastýrinum, at hann átti at boða frá fullum sparingum beinanvein, tvs, at 12 sjúkrasystrar skuldu sigast upp, heldur enn seks.

Aftur dagin eftir tosaði Jákup Mørkøre við Høgna Joensen, aðalstjóra um sparingarnar og einafeð enn spurdi hann, um hann ikki skuldi koma á fund við landstýrismannin at kunna hann um sparingarnar.

Men Jákup Mørkøre sigur, at svarið frá Høgna Joensen var tað sama, at minst 3 milliónir í sparingum var í lagi og at Helena Dam á Neystabø visti um tær.

Sjúkrahúsleiðarin var tí ikki sørt bilsin, tá ið aðalstjórin baða hann greiða landsstýrismanninum og sjúkrahúsráðnum frá ætlaðu sparingunum á fundi í sjúkrahúsráðnum hósdagin.

Tí nú var tað knappliga sum um at hvørki aðalstjórin ella landstýrismaðurin visti nakað sum helst um tær ætlaðu sparingarnar, áðrenn tær vórðu almannakunngjørdar, sigur Jákup Mørkøre.

Og síðani vórðu tær flestu sparingarnar tiknar aftur- og nú er eisini sjúkrahúsleiðarin settur frá.



## *Hans Pauli Strøm:*

# – Øll skulu kenna setanartreytirnar



*Eingin setir spurnarteikin, tá ein leiðari skal hava eitt setanar skriv, men tað er ikki vanligt, at gera tað við ein »vanligan« løntakara. Tað vilja vit broyta, og við hesum lógaruppskotinum fáa øll somu rættindi verður tað samtykt, sigur Hans Pauli Strøm*

*Tá løgtigið kom saman í gjár, legði Hans Pauli Strøm, tingmaður, uppskot fyri tingið til lóg um skyldu arbeiðsgevaranna at boða løntakarunum frá um setanartreytir teirra. Verður uppskotið samtykt merkir tað í stórum, at øll starvsfólk, skulu hava eitt setanarskriv*

Sveinur Tróndarson

Í gjár legði Hans Pauli Strøm fram uppskot á tingið sum, verður tað samtykt, hevur við sær, at allir løntakararar, sum ikki hava eitt setanarskriv, fáa eitt.

Uppskotið er nakað, sum hevur verið í huga hansara í longri tíð, og hann heldur at tað er fyri neyðini at fáa viðurskiftini upp á pláss.

– Tá eg leggi hetta uppskotið fram er tað serliga við teimum tímaløntu í huga, men tað verður galdandi fyri øll, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann heldur, at gongdin í samfelagnum tíverri hevur verið so, at tey tímaløntu eru stak illa fyri tá tosað verður um starvsavtalur, og tað man vera í teimum allarfægstu førunum, at tey kenna sínar setanartreytir, leggur Hans Pauli afturat.

– Tá ein stjóri verður settur í starv, verða sum oftast øll viðurskifti avtalað niður í minsta smálut, og í slíkum førum er einki at koma afturumaftur við. Tað eigur eisini at vera galdandi fyri tey tímaløntu, um tað ikki verður líka nágreiniligt, sigur Hans Pauli.

**Bara lønin í sáttmálanum**

Hans Pauli hevur nevniliga fest seg við, at tá sáttmálarnir hjá teimum lægstløntu og teimum hægstløntu verða samanbornir, er stórur munur á.

– Sáttmálarnir hjá teimum lægstløntu tosa so at siga ikki um annað enn um lønina, meðan sáttmálarnir hjá teimum hægstløntu taka eina rúgvu av øðrum viðurskiftum við. Tað kunnu vit bøta upp á við hesari lógini, sigur Hans Pauli Strøm.

Tað stuttliga við hesum lógaruppskotinum er, at tað formaliserar viðurskiftini hjá tí lægsta bólkinum, og til skemtunnar sigur Hans Pauli, at tey vóru betri stillað fyrr í tíðini.

– Tá høvdu tey eina »tyendelov«, sum setti ávísar treytir. Tað hava vit ikki longur, so nú er henda neyðug, sigur hann

**Kostar einki - fyri tey flestu**

Í flestu førum tá eitt lógaruppskot verður samtykt, verður nógv hugt at kostnaðinum av uppskotinum.

– Hetta uppskotið kostar so at siga ikki eina krónu, í hvussu er ikki fyri tað almenna, sigur Hans Pauli Strøm.

– Teir allarflestu almennu stovnarnir eru í tí støðu, at teir hava hesi viðurskifti í lagi, sigur Hans Pauli, sum leggur afturat, at fyri privata arbeiðsmarknaðin kostar tað næstan bara tað pappíri, treytirnar eru skrivaðar á.

Men so fær fyritøkan eisini góðan fyrimun av at hava greiðar linjur fyri øll starvsfólk, og tað heldur tingmaður Javnaðarfloksins ikki er at kimsa at tá til stykkis kemur.

– Tað ger alla umsiting nógv greiðari, bæði fyri tey tímaløntu og fyri arbeiðsgevaran, sigur Hans Pauli.

**Verkamannauppskot**

Hóast uppskotið í dag verður lagt fyri tingið av javnaðartingmanni, so er tað ikki upprunaligt uppskot frá Javnaðarflokkinum, tí líknandi uppskot hevur verið lagt fyri tingið fyrr.

– Tú kanst siga, at hetta er arvasilvur frá Verkamannafylkingini, sum legði tað fram um árskiftið 97/98. Men av tí at tað ikki var endaliga viðgjørt áðrenn val varð útskrivað, kanst tæú á ein hátt siga, at tað fall fyri knívinum hjá Edmundi Joensen, sigur Hans Pauli Strøm, sum vónar at allir flokkar fara at taka undir við uppskotinum.

**Øll verða tikin við**

Uppskotið, sum Hans Pauli legði fyri tingið í gjár, er annars ikki eitt av teimum drúgvu hóast tað umfatar alla arbeiðsmegina í Føroyum.

Sjey eru greinirnar íalt og í teimum verður ásett hvat upplýsast skal og hvør revsingin er Uppskotsstillarin heldur, sum sagt, at tað er best, at geva øllum somu rættindi, tí samstundis fært tú tryggjað tær, at allir lønarbólkar eru við.

Hóast uppskotið leggur upp til, at lógin kemur í gildi 1. mai í ár, so er ætlanin, at øll tey, sum eru á arbeiðsmarknaðinum, skulu koma undir lógina, verður hon samtykt.

Tey, sum verða sett í starv eftir 1. mai koma undir lógina av sær sjálvum, men tey, sum vóru í starvi áðrenn lógin kom í gildi, í seinasta lagið tríggjar mánaðir eftir áheitanina.

Málið varð, sum sagt lagt fyri tingið í gjár.

# Góðtekur ikki uppsøgnina

*Maðurin í rokanum á Landssjúkrahúsinum, Jákup Mørkøre, góðtekur ikki hørðu ákoyringarnar um illoyalitet og manglandi lýdni. – Men eg fái ikki úttala meg meira meðan sakførari mín og fakfelagið kanna grundgevingarnar fyri uppsøgnini, sigur hann*



Sveinur Tróndarson

Tað vóru ikki hissini ákoyringar, sum Jákupi Mørkøre vóru fyri, nú hoyring varð sett í verk við tí fyri eygað, at siga hann úr starvi.

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Helena Dam á Neystabø, sigur í skrivi til Jákup Mørkøre, at hann hevur verið illoyalur og hevur víst manglandi lýdni móti politiska myndugleikanum, hann er settur at virka undir.

Og hesi orð hava sum verða mann tikið fæst.

– Eg skilji ikki ákoyringarnar og eg góðtaki tær heldur ikkis, igur Jákup Mørkøre, sum leggur afturat, at hann hevur kunnað aðalstjóran og landsstýrismannin um alt tað sum er farið fram í hesum máli.

Tað, sum nú aftaná undrar Jákup Mørkøre er, at hvørki aðalstjórin ella landsstýrismaðurin látast vita um tað sum er farið fram, og tað skilur hann í veruleikanum ikki petti av.

– Um tú lesur frágreiðingina, sum eg sendi stýrinum um vikuskiftið, so sæst, at eg tvær ferðir havi spurt, um eg skal kunna aðalstjóran og landsstýrismannin, men báðu ferðir var svarið nei, tí landsstýrismaðurin var fult kunnaður, so tað hongur ikki saman, sigur Jákup Mørkøre, sum kortini ikki vil siga nógv meira um málið.

**Kanna uppsagnargrundina**

– Eg havi latið sakførara mínum og fakfelagnum (Føroya Verkfrøðingafelag, blðm.) málið, og teir eru farnir í holt við at kanna upppsagnargrundinar, sum eru givnar í skrivinum frá landsstýrismanninum og áðrenn tað havi eg ongan møguleika at úttala meg meira í hesum málinum, sigur Jákup Mørkøre.

Hann heldur, sum sagt ikki, at hann hevur gjørt nakað skeivt, tí sum hann sigur:

– Tað einasta eg havi gjørt er, at boða frá møguligum avleiðingum at vit ikki fáa neyðugu játtaninar. Tað tekur nakað av tíð at seta slíkar sparingar í verk, og tí má tað eisini fráboðast í góðari tíð, sigur Jákup, sum við tí ikki heldur, at hann hevur borið seg skeivt at.

Kortini er hann sum vera mann, sera fegin um, at hann skrivaði frágreiðingina, sum nú er likin út.

– Eg havi ikki sent fjølmiðlunum hana, men eg skilji, at hon er komin teimum í hendi, men hóast hon ikki er skirvað í sambandi við hoyringina, so eri eg ótrúliga glaður fyuri at eg gjørdi hana, sigur Jákup Mørkøre at enda.


TYRLUTÆNASTAN
HJÁ ATLANTIC AIRWAYS



Vegna eftirlit flýgur tyrlan ikki í tíðarskeiðinum 24. januar - 7. februar.

Atlantic Airways
Tlf. 333410 · Fax 333380